# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Lógvatak fyri oljuleiting

Tað er einki minni enn eitt ordans lógvatak, sum føroyskir oljumyndugleikar og útlendsk oljufeløg hava tikið nú beint eftir nýggjár, nú avgerð er tikin um at bora ein nýggjan brunn á føroyska landgrunninum, tann áttanda í røðini.

Hóast mong okkara kanska ikki geva slíkum tíðindum stórvegis ans, tí tey kennast so veruleikafjar, so er kortini greitt, at her veruliga er talan um kollveltandi tíðindi. Hvør veit, um vit ikki ein dag í næstu framtíð, fara at uppliva, at nettupp henda eina avgerðin, var tann, sum gjørdi okkum til eina oljutjóð!

At bora brunnar er einasti mátin at finna fram til, um kolvetni í rakstrarverdugum nøgdum finnast í undirgrundini. Og tá talan er um eitt jomfrúiligt øki, eitt váðiligt umráði, har enn einki lønandi fund er gjørt eftir seks brunnar, so kunnu vit bara vera nøgd við, at oljufeløg kortini trúgva uppá økið og vilja brúka hundraðtals milliónir fyri at finna kolvetni.

Statoil, Dong og OMV hava tikið avgerð um at bora tann áttanda brunnin við Føroyar. Og útlit eru fyri, at Statoil eisini fer at átaka sær at bora tann níggjanda brunnin.

Hetta eru góð tíðindi fyri føroyska oljuleiting, ikki minst í eini tíð, har nógv oljufeløg beint tvørturímóti skerja sínar leitiútreiðslur og als ikki bora í ov váðiligum og ókendum økjum. Og har vit longu hava verið vitni til, at fleiri oljufeløg hava tikið seg úr føroyska økinum.

Um somu tíð, sum vit fegnast um hesa stóru íløguna í oljuleiting við Føroyar, bíða øll í spenningi eftir, at ENI fer at bora sjeynda brunnin á landgrunninum longu í vár. Nógvir oljuserfrøðingar hava góðar vónir um júst henda brunnin, sum verður boraður ikki so langt frá einum fundi, sum er gjørt hinumegin markið, nevnt Cambo. Tað gevur oftani størri møguleikar fyri at útbyggja eitt fund, um oljuframleiðsla finst í grannalagnum. Og mangt bendir á, at Cambo verður útbygt.

Og nettupp tí er eisini nýggjasti brunnurin hjá Statoil so áhugaverdur. Hann verður boraður stutt frá enn einum stórum oljufundi hinumegin markið, Rosebank, sum eftir øllum at døma verður útbygt.

Við hesum báðum brunnum, ið liggja skamt frá framtíðar oljuframleiðslum í bretskum øki, má sigast, at Føroyar eru komnar eitt týðandi stig nærri eini oljuframleiðandi tjóð. At kolvetni eru staðfest í okkara undirgrund, og at stór fund eru gjørd so nær markinum, eru alt tekin um, at vit eru á røttu kós.

**Sosialurin**

## Peningur í føroyskum peningastovnum stendur tryggur

**JANUS PETERSEN**
formaður í Felagnum Føroyskir Peningastovnar



Innistandandi peningur í føroysku peningastovnunum stendur tryggur – eisini eftir 30. september 2010, tá Bankapakki I fer úr gildi.

Útvarpið hjá Kringvarpi Føroya bar í tíðindasendingini í gjár mikudagin 6. januar kl. 12.20 hesi tíðindi:

»Fólk, sum eiga pengar á kontu í føroyskum bankum, hava onga trygd fyri sínum pengum eftir 1. oktober, tá Bankapakki I heldur uppat.«

Kringvarp Føroya tykist hava misskilt eitt tíðindaskriv frá Fíggjarmálaráðnum, og Føroysku Peningastovnarnir gera tí vart við, at innlán í føroyskum peningastovnum eru eins trygg og í teimum donsku.

Her eru fakta í málinum:

· Fram til og við 30. september 2010 eru øll innlán tryggjað 100% við Bankapakka I.

· Fíggjarmálaráðið og Fíggjareftirlitið samstarva í løtuni um at fáa lagt eitt lógaruppskot um nýggja innskjótaratrygd fyri Løgtingið. Tá tað er samtykt – ætlandi í góðari tíð áðrenn 30. september 2010 – verður innskjótaratrygdin uml. 750.000 kr. Løgið skuldi verið, um nakar kundi verið ímóti eini tílíkari lóg, sum onga útreiðslu hevur fyri landskassan, og sum er til fyrimun fyri føroyskar borgarar.

· Skuldi tað óvæntaða hent, at lógaruppskotið ikki verður samtykt áðrenn 30. september 2010, er framvegis innskjótaratrygd galdandi eftir hesa dagfesting. Trygdin er tá 300.000 kr.

Ongin saklig orsøk er at halda ella gita um, at innskjótaratrygdin í Føroyum eftir 30. september 2010 verður øðrvísi enn í Danmark, tvs. 750.000 kr.

## Fjølmiðlar í negativari ringrás

**JÓANNES EIDESGAARD**



Eitt av eyðkennunum við nýggjárinum er, at mong okkara seta sær nýggj mál - at okkurt skal broytast ella gerast øðrvísi í tí nýggja árinum. Vit mugu tíverri longu nú staðfesta, at okkara fjølmiðlar neyvan hava tikið henda táttin upp, men heldur halda fram eftir sama leisti. Málið er alt ov sjáldan sakligur framburður av tíðindum, men heldur hin vegin at fáa tíðindini serliga tey, sum koma úr politiska umhvørvinum, latin í ein so neiligan og so negativan ham sum gjørligt. Lat meg taka trý dømi, nú árið bert er góða viku gamalt:

Dømi 1: Sosialurin hevur í einum leiðara hesa orðing:"Fíggjarlógin hongur ikki saman. Landsstýrissamgongan megnaði ikki at finna neyðugu bygnaðarligu sparingarnar. Skattir skulu ikki hækka, og avgjøld skulu ikki hækka."

Fíggarlógin hongur sanniliga saman, tó hon hevur eitt stór hall. Grundleggjandi tænasturnar í samfelagnum eru væl og virðiliga fíggjaðar. Vit hava gamaní ikki framt allar tær bygnaðarligu broytingarnar enn, sum vit arbeiða við, men á fíggjarlógini eru tó broytingar. Niðurlaging og uppstramming av rentustuðulsskipanini (fyrstu ferð í 15 ár), stigvíst verður mvg-stuðulin til sethúsabygging tikin av og ikki minst Heilsutrygdin. Hetta eru so bygnaðarligar broytingar, um man vil tað ella ei. Men rætt er, vit eru langt frá komin á mál enn, og tí halda vit fram.

Skatturin er eisini hækkaður við 2% fyri inntøkur oman fyri 400.000 kr., lønarhæddaravgjaldið er hækkað til tað dupulta, og eitt nú hækka prísirnir hjá SL við 12%.

So her er ikki bert talan um negativan framburð hjá Sosialinum, men um beinleiðis ósanna skriving.

Dømi 2: SVF hevði eitt rættiliga stórt innslag um nýggju Heilsutrygdina. Men nú var søgan ikki henda stóra bygnaðarliga broytingin, sum fer at gera veruliga mun fyri vanliga føroyingin. Nei, nú var spurningurin, um talan var um eina skattalækking ella eina skattahækking í 2012. Gamaní hevur ávísur tingmaður, sum sær tað sum sítt fremsta mál at stinga skør, dyrkað henda spurningin nógv, men tí nýtist ikki SVF at loypa á leistum aftaná.

Stutta av tí langa er, at Heilsutrygdin verður frá 2012 fíggjað á fíggjarlógini. Allar útreiðslur á fíggjarlógini eisini henda til Heilsutrygdina verða fíggjaðar við skatta- og avgjaldsinntøkum. Longur er tann søgan ikki.

Kanska kundi SVF heldur lýst fyrimunirnar við nýggju skipanina ella kanska spurningin um ognirnar hjá gomlu sjúkrakassunum.

Dømi 3: Triðja dømi er úr Útvarpinum, har yvirskriftin henda dagin ljóðaði, at nú var óvist um føroyingar eftir 1. okt. í ár yvirhøvur fingu nakra trygd fyri innlánum í føroyskum peningastovnum. Slík yvirskrift kann loypa ótta á fólk, so tey kanska flyta innlánini av landinum. Vónandi hevur redaktiónin umhugsað hetta.

Men veruliga søgan var jú ein heilt onnur. Fram til 1. okt. eru øll innlán uttan mun til, hvussu stór tey eru, tryggjaði við Bankapakka I. Fíggjarmálaráðið leggur í vár uppskot fram, sum fer at gera, at øll innlán eftir 1. okt. verða tryggjaði upp til 100.000 evrur ella á leið 750.000 kr. Henda trygdin hevur áður verið 300.000 kr. Við øðrum orðum verður trygdin meira enn tað dupulta.

Vit vita øll - eisini tit í Útvarpinum, at hetta uppskot fær stóra undirtøku í Løgtinginum, og tí verður samtykt uttan trupulleikar uttan mun til, hvat annað møguliga hendur. Men henda góða søgan kom als ikki fram, heldur ikki eftir at Felagið Peningastovnar eftir ódámligu yvirskriftina í Útvarpinum sendi út tíðindaskriv.

Hetta vóru so trý dømi, sum nærløgd tíðindafólk neyvan erpa sær av.

Annars gott nýggjár til fjølmiðlarnar.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddr:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.